# HEILSANIR



Hjartaliga takka vit øllum, sum gleddu okkum á hjúnabandsdegi okkara 7. juni 2008.
Tøkk fyri gávur, blómur, fjarrit og heilsanir.
**Jóna og Bogi**



**Góða Mille**
Hjartaliga tillukku við 10 ára degnum.
Tað er so stuttligt at hava teg
her heima í summar.
Minst nú til at drekka nógva kala...
**Muss og klemm frá ommu og abba**



23. august verður hendan fitta gentan 11 ár. Tí vilja vit ynkja henni tillukku og biða Jesus pápa signa henni lívs leiðina.
**Ynskja strandaomma, strandaabbi, Marjun, Stein og Silja**



**Góða elskaða Halla**
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum 23. august. Jesus pápin passar væl uppá Hallu. Muss og klemm.
**Omma, abbi og Petur Frank**



**Góða Halla**
Gubbasa allarbesta. Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum 23. august. Muss og klemm.
**Jákup gubbi**



Ein hjartans tøkk til tykkum øll, sum gleddust saman við okkum og gjørdu okkum hjúnabandsdagin 3. mai 2008 ógloymandi. Takk til familju og vinir fyri sera góða hjálp, uttan tykkum hevði dagurin ikki verið møguligur og so væl eydnaður. Takk til Ingu P. Dam prest fyri góða talu í kirkjuni og takk til dekn, klokkara og organist fyri hjálpina. Eisini vilja vit takka fyri gávur, heilsanir og telegrammir, takk øll somul
**Ynskja Fríðgerð og Rani í Líð**



**Góða fitta Halla**
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum
23. august. Guð signing framtíð tína.
Vit elska teg sooo nógv.
**Ynskja mamma og babba**



**Góða Beinta**
Tillukku við føðingardegnum 22. august.
Eisini ein heilsan til William.
**Heilsan mamma og systrarnar**